# Svenning av Lofti við nýggjari bók

**Forlagið Leirkeri í Gøtu hevur givið út bókina "Tað hendi umborð 2", sum Svenning av Lofti hevur skrivað. Hetta er onnur bókin í røðini "Tað hendi umborð". Fyrsta bókin kom út í 2002**

NÝGG BÓK




a v



Frásøgurnar í bókini eru persónligar frásøgnir, og verður sagt frá nógvum grípandi hendingum, sum hava havt stóra ávirkan á hesar persónar. Eisini vísir bókin, at tað mangan er við lívinum í vága, at okkara sjófólk vinnur sær til lívsins uppihald.

Evnið í bókini er, eins og í hini fyrru, lívs- og umvendingarfrásøgur, og talan er um eitt tíðarskeiðið, ið røkkur frá 1914-1993.

"Tað hendi umborð 2" er 192 blaðsíður og er prýdd við umleið 140 myndum.

Svenning sigur m.a. í fororðunum til bókina: "Henda bókin er í takksemi ognað minninum um mín góða vin og andaliga vegleiðara, Petur Háberg, sum fyrstantíð orðaði við meg um at geva út bók um hetta evnið: at menn komu umvendir heim aftur av skipi".

12 mans siga frá, hvussu teir vórðu umvendir umborð á skipi, av teimum eru 9 á lívi.

Teir eru: Niels Juel Olsen, Tórshavn, Dorian Petersen, Tórshavn, ættaður úr Klaksvík, Petur Djurhuus, Tórshavn, ættaður úr Nes-Vági, Sámal Jákup Hansen, Klaksvík, Menning Jacobsen, Morskranes, Jóannes Heinesen og Svenning Sørensen, Viðareiði, Jákup Elias Olsen, Hvalba, og Gullak Madsen, Hirtshals, ættaður úr Kvívík.

Teir sum eru farnir: Poul Andrias Mortensen, Sørvágur, Hans Pauli Johannesen og Conrad Joensen, Tórshavn.

Niels Juel Olsen sigur m.a. frá síni umvending umborð á trolaranum "Beinir". Eftir at hann var komin í dýrastu neyð við-víkjandi andaligu støðu síni og hevði biðið saman við einum av manningini, Ivan Skorheim, merkti hann onga broyting og var ikki sørt vónsvikin og tunglyndur. Hann helt, at hann skuldi fara upp til ein annan trúgvandi mann umborð, Otto Johannesen,

"Hann hevði bert stigið nøkur fá fet upp gjøgnum tey 30-40 trappustigini, tá ið hann kendi eina yvirnatúrliga kraft koma yvir seg, og fekk hann beinanvegin ta sannføring, at hann var frelstur. Hann var sum eitt fok uppiá, læt kamarshurðina hjá Otto upp og segði: "Otto, eg eri frelstur". "Tað síggi eg " segði Otto".

Jóannes Heinesen var við "Viðoynni" í 1955, tá hann kom til umvending. Hann hevði stórar trupulleikar av rúsdrekka. Hetta gjørdist honum ein stórur meinbogi, tí drykkjuskapurin øktist, sum árini gingu.

Eitt kvøldi hann lá í koyggjuni, og ikki fekk sovið, kom hann í stóra sálarneyð. Tá kom tað kenda versið í jóh. 3,16 fram fyri hann, og hann fekk frið við Gud. Sálarbyrðan, ið hevði nívt hann, varð í einum eygnabragdi tikin burtur og hitt æviga ljósið, sum er Jesus, fylti sál hansara.

"Brennivínið, sum hann hevði keypt heim við sær, gjørdist honum ein slík marra at eitt kvøldi á heimferðini tók hann brennivínskassan, bar hann upp á dekkið, fór út móti lúnningini við honum og tveitti hann fyri borð. Jóannes hevur ongantíð síðan smakkað rúsandi løg".

Á baksíðuni á bókini skrivar Árni Joensen, skipari, í Oyndarfirði m.a.

"Hesin partur av siglingarsøgu okkara hevur størri týdning, enn fleiri geva sær far um, tí her er talan um andaligan og ævigan týdning, har lív teirra, ið funnu henda signaða frið, varð so avgerandi broytt, at tað merkti bæði teir, hús teirra og tey, ið teir komu saman við eftir hesa hending"

Aftast í bókini eru persóns- og skipanøvn í bókstavarøð og keldurnar.

Bókin, ið kostar 275 krónur, fæst í bókabúðunum kring landið, frá forlagnum og frá høvundanum.

## VIÐMERKINGAR

# Vísindasiðsemisnevndin

**Bill Justinussen**



So var hon aftur á skránni. Bert tvey ár eru liðin, síðani vísindasiðsemisnevndin seinast varð vald, og vanliga eiga limirnir at sita í 4 ár. Hví landsstýrismað-urin nú so brádliga hevur valt allar 7 limirnar av nýggjum og ongan av undanfarnu limunum læt sleppa at halda áfram er undrunarsamt.

**Framhaldið (kontinuitetur)**

Tá undirritaði sum landsstýrismaður fyri tveimum árum síðani valdi nevndina, var funnist at á fleiri økj-um. Sagt varð av tingfólkum, tíðindafólkum og øðrum, sum tóku lut í orðaskiftinum, at skeivt var at skifta 4 limir út samstundis, tí neyðugt var við einum ávísum framhaldi fyri at tryggja viðgerðini av ymsu málunum eina høga góðsku. Tá valdi eg at lata tey 3 umboðini, sum læknaráðið peikaði á, halda fram, meðan hin 4 umboðini vórðu vald av nýggjum. Øll umboðini høvdu tá sitið - minnist meg rætt - í meiri enn 4 ár. Eftir míni meting varð framhaldið í arbeiðnum tryggjað við at lata øll trý læknaumboðini halda fram, meðan hini 4 umboðini vórðu vald av nýggjum. Síðani var mín ætlan, næstu ferð limir skuldu veljast, at leggja upp til, at læknaumboðini vórðu skift út, meðan hinir limirnir hildu fram. Á tann vildu læknarnir verið skiftir út aðru hvørja ferð og hinir limirnir aðru hvørja ferð, og sostatt vildi framhaldið í arbeiðnum verið tryggjað. Men hesin landsstýrismaðurin hevur valt at skifta øll út samstundis, og sostatt er ongin nevndarlimur eftir, sum hevur innlit í tey málini, sum eru viðgjørd og eru til viðgerðar.

**Leik og lærd**

Eftir míni fatan er neyðugt í slíkum arbeiði, sum vísindasiðsemisnevndin fæst við, at meginparturin av nevndarlimunum hevur viðkomandi akademiska útbúgving. Tað hava teir 3 læknarnir sjálvsagt, men harumframt eiga flestu av hinum umboðunum eisini at hava viðkomandi útbúgvingar fyri at kunna geva læknunum eitt hóskandi mótspæl og fyri yvirhøvur at kunna luttaka á jøvnum føti. Hesa meginreglu meti eg, at umsitingin hjá landsstýrismanninum hevur mælt honum til at halda fast við, men tað er hann helst farin nakað lætt um. Ella hevur umsitingin broytt hugburð. At ongin av teimum 7 er løgfrøðingur, er átalu vert, tí arbeiðið í nevndini hevur mangan tungar løgfrøðiligar spurningar við sær, sum kunnu vera kostnaðarmiklir at fáa viðgjørdar uttanhøsis.

**Tíðindafólk**

Fyri tveimum árum síðani fekk eg nógvar atfinningar frá fjølmiðlunum fyri mítt val av nevndarlimum. Nú hevur landsstørismaðurin sett eitt tíðindafólk í nevndina og ein varalim, so nú vænti eg, at tíðindamiðlarnir lata mannin fáa frið. Um landsstýrismaðurin hevur havt nakrar baktankar við hesum valinum, kann ein bert gita um. Men eg haldi, at av øllum eru tíðindafólk tey, sum seinast eiga at fáa tilboð um nevndarsessir frá tí almenna, tí tey vilja alt fyri eitt fáa loyalitetstrupulleikar. Og tað veit almenni myndugleikin sera væl, og tí kann tað hesin háttur at keypa sær frið skjótt metast sum misnøtsla av sínum valdi. At tíðindafólk ikki hava eina etiska grundreglu, sum mælir teimum frá at gerast nevndarlimir, er sjálvandi at harmast um, men onki slíkt yvirmenniskja finst, sum er ført fyri at bera fleiri kasjettar á sama høvdi. At valdi tíðindamaðurin er skilamaður og væl kvalifiseraður til sessin hevur onki við málið at gera; hetta er als ikki ein persónsspurningur, men ein spurningur um meginreglur.

**Tingið**

Nú nevndin er vald av nýggjum, verður spennandi at vita, hvussu Løgtingið fer at taka ímóti avgerðini. Løgtingið skal halda eitt vakið eyga við embætisførsluni hjá landsstýrismonnum, og møguliga verður neyðugt at taka málið upp í tinginum, um ikki landsstørismaðurin hevur eina skilagóða frágreiðing um, hví fráfarna vísindasiðsemisnevndin øll sum hon er so brádliga ikki kundi brúkast meir.